TIL **ARBEIÐIS**



*Seinastu 27 árini hevur 58 ára gamli William Mackey úr Funningi ruddað vegin til Gjáar fyri kava*

MYND: EIRIKUR Í JÁKUPSSTOVU

# LÍVLINJAN **HJÁ GJÁARFÓLKI**

LIGGUR **KAVI** Í FØROYUM, SO LIGGUR KAVI Á **GJÁARVEGNUM**. EINASTA VÓN HJÁ BYGDARFÓLKINUM AT SLEPPA AV BYGDINI ER, AT **WILLIAM MACKEY** KEMUR NORÐUR TIL GJÁAR VIÐ MASKINUNI, SUM FÆR MESTA KAVAN AV VEGNUM. – EG KANN SIGA, AT EG HAVI GRIVIÐ Í **20 DAGAR** Í ÁR, MEN TAÐ KANN LÍKA SKJÓTT VERA TAÐ DUPULTA, SIGUR WILLIAM MACKEY, SUM STAÐFESTIR, AT TAÐ HEVUR VERIÐ **ÓVANLIGA** NÓGV AT GRAVA Í ÁR



**TIL ARBEIÐIS**
Eirikur í Jákupsstovu
eij@sosialurin.fo

Klokkan er farin beint av fimm á morgni. Volvomaskinan stendur beint uttanfyri Funning og brummar.

Ein rundleiddur maður við brillum og við endurskinum á gula Landsverksjakkanum kemur úr maskinuni, og bjóðar mær upp í til Gjáar og aftur.

Rutan hjá bygdarleiðum kemur um hálvgum sjey tíðina, og er nógvur kavi, so ríður um snarið at fáa vegin ruddaðan áðrenn tað. So her er onki at bíða við.

Svarta skuffan verður sett niður móti vegnum, og maskinan við roynda vegruddaranum og blaðmanninum fer niðan gjøgnum brekkuna úr Funningi.

– Tú mást spyrja meg okkurt. Tit plaga at spyrja so nógv, flennir William Mackey, sum rundleiddi maðurin við brillunum eitur. Hann hevur grivið kava av vegnum til Gjáar í 27 ár, og koyrir sum um, hann bara var ein róligan biltúr. Onki stríð, onki stress, og vit hava góða tíð at práta.

Mackey'urin, sum hann eisini ofta verður nevndur, fer sjálvur í gongd við at greiða frá tí, sum blaðfólk ofta vilja hoyra.

– Her er ofta rættiliga ófantaligt. Eg kann fortelja tær um einaferð, tað var serliga galið. Tað var í gomlu maskinuni, tað var nógvur vindur og nógvur kavi, og tað endaði við, at eg var púra hvítur inni í maskinuni. Kanska var hon ikki líka tøtt sum hendan, men tú kanst ímynda tær, hvussu galið tað hevur verið.

– Hugsað tær um okkurt gekk galið, hugsar hann hart, og skoytir upp í, at hann enntá lovaði olmussu, tí tað var lítið sannlíkt at nakar kundi koma honum til hjálpar.

## Einsligt og ótakksamt

Hetta, at hann er einsamallur um uppgávuna, og at tað kann gerast einsligt ger William Mackey eisini greitt.

– Síðan útvarpið í maskinuni gekk fyri havi eg merkt tað enn meira, at hetta er rættiliga einsligt, viðgongur hann á funningsmáli, har serliga *t'*ini eru so mikið bleyt, at tey minna mest um *d*.

– Men tað er ikki bara tað. Hetta er so øgiliga ótakksamt, tí ofta arbeiðir mann næstan til onkis. Problemið er ikki, at tað kavar, men onkuntíð fýkur tað so illa, at eg nóg illa eri komin til Gjáar, áðrenn tað ikki er koyrandi niðan úr Funningi. Men í dag er ikki so galið. Tú skuldi heldur verið her sunnudagin, tá var ov mikið at gera, sigur Mackey'urin.

Tað er heldur ikki so galið við kava morgun. Eitt følv er á vegnum. Tað hevði ikki verið koyrandi hjá vanligum persónbili, men tað gongur so mikið lætt at grava, at tað bert tekur trý korter at koma upp um 305 metra høga Gjáarskarð og til Gjáar, har ljós er at hóma í myrkrinum í einum hvítum húsum í bygdini og á Gjáargarði.

Vit venda niðri við niðaru brúnna í bygdini, tá klokkan byrjar at nærkast seks, og fara niðan aftur gjøgnum dalin.

## Heldur lív í bygdini

Hóast William Mackey staðfestir, at arbeiðið bæði er einsligt og ótakksamt, so hevur hann fingið nøkur rósandi orð á vegnum.

– Ein kona í bygdini sendi einaferð sms til morgunsendingina, og segði, at teir, sum grava til Gjáar halda lív í bygdini, fortelur William eitt sindur errin, beint áðrenn vit koma niðan aftur á Gjáarskarð.

Og hann gongur eisini høgt uppí, at fólkini í bygdini skulu halda fast við asfalteraðu lívlinjuna.

– Eri eg tað minsta í iva, um tað er koyrandi, so fari eg avstað at grava, fortelur William Mackey.

Vit nærkast aftur Funningi. Høgur kavi er báðu megin vegin, men lítið er fokið út á vegin, so tað er bara at skava eitt sindur upp í skuffuna.

Ein onnur. Nógv størri maskina kemur koyrandi. Hon kemur úr Funningsfirði beint nú, og William fortelur, at hann fer at hjálpa hinum, at fáa tað seinasta upp á pláss á tí vegnum.

Klokkan er blivin hálvgum sjey. Lítli blái bussurin hjá bygdaleiðum kemur koyrandi. Hann fer til Gjáar eftir børnunum, sum aftur í dag sleppa í skúlan, tí Mackey'urin hevur grivið kavan av vegnum.

## FAKTA **WILLIAM**

**Navn:** William Mackey
**Starv:** Vegadeildin hjá Landsverki
**Besta við starvinum:** At gera mun, lønin og tað var spennandi, tá eg var ungur
**Ringasta við starvinum:** Tað er einsligt og líkist nógv frá degi til dags
**Størsti dreymur við starvinum:** At tað kundu verið fleiri um at grava til Gjáar, tá nógvur kavi er
**Størsta frambrot:** At hava fingið nýggja maskinu, sum larmar minni
**Starvstíð:** 37 ár hjá Landsverki og grivið til Gjáar í 27 ár
**Starvsfólk:** 155 hjá Landsverki
**Sett á stovn:** 1948
**Staður:** Tinghúsvegur 5 í Havn
**Stjóri:** Oyvindur Brimnes